Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 11

ISSN 0907-905X

Nr. 26

6. apríl 2011

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 103 frá 11. november 2010 um broyting í lóg um almenna forsorg verður § 2, stk. 2 orðað soleiðis:

„§ 1, nr. 1 í hesi lóg fer úr gildi 1. januar 2012.“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 6. apríl 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 95/2010

# Kunngerð um broyting í kunngerð um gjøld fyri veterinerar og heilsufrøðiligar kanningar og eftirlit

### § 1

Í kunngerð nr. 6 frá 26. januar 2009 um gjøld fyri veterinerar og heilsufrøðiligar kanningar og eftirlit verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 6, stk. 1, 1. pkt. verður „33 kr.“ broytt til „26 kr.“
2) Í § 6, stk. 1, verður sett sum nýtt pkt. 2: „Gjaldið verður gjørt upp við støði í nøgdini av livandi vekt, sum var tikin inn á virkið kalendaraárið frammanundan.“
3) § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis: „Fyri váttan, kanning ella eftirlit við livandi dýrum, heruppií akvakulturdýrum, ella úrdráttum úr dýrum, í Føroyum og í samhandlinum við ES, verða, umframt ein grundupphædd, ið fevnir um fyrireikingar- og flutningskostnað upp á 1725 kr, rindað hesi gjøld:
   1) 345 kr. um tíman fyri hvørt eftirlitsfólk, um talan er um gerandisdagar millum kl. 06.00 og 17.00,
   2) 517 kr. um tíman fyri hvørt eftirlitsfólk, um talan er um gerandisdagar millum kl. 17.00 og 22.00, og
   3) 690 kr. um tíman fyri hvørt eftirlitsfólk, um talan er um gerandisdagar millum kl. 22.00 og 06.00, leygardagar eftir kl. 14 og sunnu- og halgidagar.“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 11. apríl 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um gjøld fyri løggilding av elinnleggjarum

**§ 1**

Í kunngerð nr. 111 frá 17. oktober 1994 um gjøld fyri løggilding av elinnleggjarum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 111 frá 11. desember 2008, verður í § 1, stk. 2 og stk. 3 „3.000,00“ broytt til „1.700,00“.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 01.01. 2011.
*Stk. 2.* Ov nógv kravt gjald fyri 2011 verður rindað løggildugu elinnleggjarunum aftur.

Vinnumálaráðið, 11. apríl 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705